# NØKUR TÚSUND FÓ





## Argjabáturin vann langteinaróðurin

**Úrslitið av 6 kilometra langteinakappróðrinum var, at Argjabáturin gjørdist vinnari við tíðini 30,42,3 minuttir, Ørvur var nummar 2 við tíðini 30,48,0 – og á triðja plássi kom Havfrúgvin við tíðini 34,24,5 minuttir.**

**Smyril gjørdist nummar 9 og endaði aftastur við tíðini 32,54,00 minuttir.**

**Langteinakappróður er ein nýggjur róður, har allar bátastøddir, undantikið barnaróður, kappast móti hvørjum øðrum. Tíðirnar verða umroknaðar, soleiðis at allir bátar – líka mikið stødd – hava møguleika at vinna róðurin. Soleiðis kann eitt 5-mannafar vinna á einum 10-mannafari.**

*vilmund@sosialurin.fo*

## Trøllafamilja og konsertir

**Seinnapartin fríggjadagin og fríggjakvøldið skipaðu vestmenningar eisini fyri stórum og áhugaverdum tiltøkum, sum savnaðu nógv fólk.**

**Eitt av hesum tiltøkum var langteinakappróður, og eisini kom trøllafamiljan á vitjan við tyrlu, eins og børnini sluppu at uppliva eitt stórt krígsskip við kanónum.**

**Skipað varð eisini fyri væleydnaðari barnakonsert, og seinni fríggjakvøldið vóru vælumtóktu Páll Finnur Páll á palli í Ítróttarhøllini í Vestmanna.**

*vilmund@sosialurin.fo*